# Seksti ár á hestabaki

**Føroya Ríðingafelag er vorðið seksti ára gamalt, og støðan í felagnum hevur ongantíð verið betri. Næsta málið er at fáa eina nýggja høll upp í Havnadali**



*Føroya Ríðingafelag helt hósdagin 60 ára føðingardag. Til dagligt er útibarnagarður í hølunum hjá felagnum í Havnardali, og børnini dáma væl rossini.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

FØÐINGARDAGUR
*Heri á Rógvi*

Kaffi og ísur var á borðinum í Havnardali týsdagin. Børnini í útibarnagarðinum høvdu jóladagar. Orsøkin var, at elsta felagið av sínum slag í Føroyum, Føroya Ríðingafelag, helt seksti ára føðingardag.

Felagið lænir húsið til Tórshavnar kommunu til útibarnagarð, og tað er valla nakar, ið er so glaður fyri hestar, sum børnini í útibarnagarðinum.

Tað eru nevniliga seksti ár liðin síðani Aksel Hansen Hanen, J. P. av Reyni og Leivur Trónd Hansen tóku stig til at stovna eitt ríðingafelag. Ikki bert fyri ríðufólk í Havn, men í øllum Føroyum.

– Tað hevur altíð verið riðið nógv mest í Havn, men felagið hevur limir úr øllum Føroyum, sigur Hans Vilhelm Lützen, formaður fyri Føroya Ríðingafelag.

Í dag hevur felagið 385 limir. Rossini eru eisini mong í tali; bara í Havn eru hálvtannaðhundrað.

Áhugin stendur við og veksur, metir formaðurin.

– Áhugin millum limirnar er eins stórur og altíð. Eisini merkja vit áhuga millum ung at ogna sær ross, men tað er ikki altíð, at tey hava umstøðurnar, sigur Hans Vilhelm Lützen. Tað er heldur ikki bara sum at siga tað, at hava ross. Tey skulu passast.

– Tað er akkurát sum við børnum – tey skulu passast allatíðina og fáa at eta, sigur Hans Vilhelm Lützen skemtandi.

Í Havnardali hava tey felagsfjós, og hetta hjálpir væl, sigur Hans Vilhelm. Á henda hátt fáa tey hjálpt hvørjum øðrum við rossunum, t.e. at geva teimum at eta, halda fjósið í standi osfr.

Hans Vilhelm sigur seg rokna við, at eitt ross kostar einar tíggjutúsund krónur í fóðuri um árið.

### Sjálvboðið

Tað ber illa til at siga annað enn at samanhaldið í felagnum er gott. Limirnir standa saman um uppgávurnar. Eitt nú húsið hjá teimum í Havnardali er smíðað við sjálvbodnari arbeiðsmegi frá limunum, og hetta ger, at húsið kundi smíðast fyri eina lutfalsliga lítla upphædd.

– Samanhaldið í felagnum er øgiliga gott. Hvønn dag eru fólk úti í Havnardali, og limirnir plaga at standa saman um ymisk arbeiði, sum skulu gerast, sigur Hans Vilhelm Lützen. Felagið skipar fyri kappríðingum og ymsum túrum, sum eru fæstir tættir.

Næsti stóra ætlanin hjá felagnum er at gera ein ríðihøll í Havnardali. Hendan skal eisini fáast upp við sjálvbodnari arbeiðsmegi. Høllina hevur felagið fingið ókeypis frá formanninum, og hon er klár at seta upp. Væntandi verður farið í holt við hetta arbeiðið einaferð í næstum. Høllin verður 27x60 metrar til støddar, og ætlanin er nýta høllina til ymsar venjingar og kappingar.

Føðingardagurin verður eisini hildin við einari stórfingnari veitslu fyri limum og øðrum innbodnum næsta vikuskiftið.

# Rentulækkingar ávegis

**Stjórin í Føroya Sparikassa roknar við, at danski nationalbankin fer at fylgja Evropeiska sentralbankanum og lækka rentuna innan leingi, og hetta fer mest sannlíkt at viðføra eina rentulækking í Føroyum. Húsalánsgrunnurin hevur longu lækka rentuna**

RENTUSTØÐI
*Heri á Rógvi*

Tað er væntandi, at Evropeiski sentralbankin fer at lækka rentuna í næstum. Hetta vil ávirka tann danska nationalbankan til at lækka sína rentu, og sostatt verður rentan í Føroyum vætnandi eisini sett niður.

Hetta sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa.

Hann sigur, at hóast rentan er søguliga lá, so eru greið útlit fyri, at rentan fer at lækka enn meira í næstum.

– Upp á stutt sigt vilja vit óivað fara at síggja eina rentulækking í Evropa, sum mest sannlíkt eisini fer at innibera eina rentulækking í Føroyum, sigur Marner Jacobsen.

Tað er serliga spenta støðan við Irak, sum er orsøkin til lækkingina.

– Støðan viðvíkjandi Irak hevur gjørt, at evran er styrkt munandi í mun til dollaran, sigur Marner Jacobsen.

Væntandi verður rentulækkingin hjá Evropeiska sentralbankanum 0,5%, men tað er óvist, hvussu hetta fer at ávirka føroyska marknaðin – bæði viðvíkjandi innlánum og útlánum.

– Vit fáa illa koyrt rentuna á innlánunum longur niður. Tìskil vilja vit helst fara at missa pening av einari rentulækking. Eg kann tó einki siga um, hvønn týdning hetta fær, tí fara ikki at fyrihalda okkum til hetta fyrr enn rentan er lækkað, sigur Marner Jacobsen.

Eitt lægri rentustøði vil fáa positiva ávirkan á vinnulívið, men tað kann væl hugsast, at vanligu sethúsalánini ikki fara at merkja tað stóra.

*Leiðslan í Føroya Sparikassi rokna við rentulækkingum í næstum, og hetta er gott fyri vinnulívið, men Sparikassi kann missa orsakað av søguliga lága rentustøðinum.*



– Hetta, at rentan lækkar, er sjálvandi positivt fyri vinnulívið, sigur Marner Jacobsen.

Føroya Sparikassi lækkaði seinast rentuna í desember.

### Gott fyri lánsbrøv

Gongin á virðisbrævamarknaðunum hevur so at siga søguliga vánalig seinasta árið ella so.

– Eg tori ikki at spáa longur um virðisbrævamarknaðinum. Tað er ikki gott at vita, hvar botnurin er, sigur Marner Jacobsen.

Tað eru serliga altjóða partabrøv, sum hava merkt sviðan av gongdini. Marner Jacobsen sigur, at nakrir størri stovnar í Føroyum eiga pening í tílíkum partabrøvum, men talan er ikki um teir heilt nógvu pengarnar – og lítið av privatum keyparum.

Tá rentan lækkar, so eru hetta góð tíðindi fyri lánsbrævaeigarar. Við væntaðu rentulækkingini við virðið á lánsbrøv hækka.

### Lækka

Stýrið fyri Húsalánsgrunnin hevur avgjørt at lækka rentuna.

– Við grundarlagi í altjóðarentuni verður grunsins rentustig javnan eftirhugt. Av tí at altjóðarentan er lækkað, hevur Húsalánsgrunnurin avgjørt at lækka rentustigið, stendur at lesa í tíðindaskrivi frá Húsalánsgrunninum.

Nýggju rentusatsirnir eru 4,0% fyri 1. veðrættarlán og 6,50% til 7,50% fyri onnur lán.

Gamla 1. veðrættarrentan var 4,75%.

Jóannes Dalsgarð, stjóri fyri Húsalánsgrunnin, sigur, at tey fylgja við gongdini úti í heimi, og tær leggja rentuna eftir altjóða støðinum, men plaga at vera varnir við at gera broytingar. Men hesaferð var hetta hildið vera neyðugt, sigur Jóannes Dalsgarð.



Norðoya Sparikassi:

# Fimta metárið á rað

**Fimta árið á rað kundi Norðoya Sparikassi leggja ein roknskap við einum ársúrsliti, sum slær metið frammaundan, fram fyri aðalfundin hjá stovninum, sum var týsdagin. Peningastovnurin fegnast sjálvsagt um gongdina, men tað eru bersøgnir menn, sum Sosialurin hevur sett stevnu í samband við fundin, roknskapin, framtíðina og komandi ábyrgdarfundin**



*Eyðfinn Reyðberg, stjóri og Óli Marner Christiansen, nevndarformaður í Norðoya Sparikassa fegnast um góðu gongdina hjá peningastovninum seinastu fimm árini*

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** – Við nøgdum viðskiftafólkum og starvsfólkum kemur ein langt, ásannar stjórin í Norðoya Sparikassa, Eyðfinn Reyðberg, tá hann setur seg saman við Óla Marneri Christiansen, nevndarformanni í Sparikassanum, niður til eitt stutt prát um góðu gongdina og framtíðina hjá Norðoya Sparikassa.

Hann sigur eisini, at sjálvandi kemur góða úrslitið eisini av, at norðoyingar eru trúfastir mótvegis peningastovninum, men hann leggur samstundis dent á, at so longi, sum ein røkir tað, ein hevur, væl, og so longi sum ein trýr upp á tað, so kemur nógv burturúr.

Eyðfinn og Óla Marner fegnast sjálvandi um góðu gongdina hjá Norðoya Sparikassa seinnu árini, men teir eru eisini greiðir yvir, at ein tílík gongd neyvan fer at halda fram.

– Tað er ikki veruligt at hugsa, at hetta fer at halda fram, sigur Eyðfinn Reyðberg og skoytir upp í, at Sparikassin skal ikki bara vinna pening, men hann skal eisini mennast, og tað fara eisini koma framtíðar íløgur.

Tíðliga í fjør keypti Norðoya Sparikassi helmingin av einum bygningi í Niels Finsensgøtu 7 í Havn. Men hóast tað, so siga teir, at tað er ikki vist, at ætlanir eru um at lata eina deild upp í høvuðsstaðnum.

– Við hesum keypinum er tann møguleikin nærri veruleikanum, men tað er slettis ikki vist, at Havnin er tað mest spennandi staðið at lata eina nýggja deild upp í, siga teir báðir við atliti at einum komandi undirsjóvatunli um Leirvíksfjørð.

### Netsparikassi og ábyrgdarafundur

Einaferð í vár letur nýggi netsparikassin upp. Hetta er ein tænasta, sum allir peningastovnarnir í Føroyum fara í gongd við. Hon fer at geva øllum, sum hava atgongd til internetið møguleika til at fáa eitt fult yvirlit vir konti sínar, at gera flytingar umframt at gera útrokningar heimanífrá.

Stjórin í Norðoya Sparikassa er sera spentur upp á hesa nýggju skipanina, sum óivað fer at lætta um arbeiðið í avgreiðsluni.

– Hetta kemur uttan iva at leysgera eini tvey fólk, men tað merkir ikki, at vit koma at siga nøkrum upp, tí tað liggja aðrar uppgávur fyri, sum tey so kunna taka sær av, sigur Eyðfinn, sum heldur at ein tílík skipan verður ein fyrimunur fyri allar partar.

Frammanundan er Heimagreiðslan, men hon hevur meira verið ætlað teimum vinnuligu kundunum, men tá henda nýggja skipanin er farin at koyra, væntar Eyðfinn, at tað vera tey flestu viðskiftafólkini, sum fara at nýta hana.

– Ein av størstu fyrimununum við nýggju skipanini er, at um til dømis ung fólk fara at nema sær útbúgving aðrastaðni, so nýtist teimum ikki at stovna sær konto í einum nýggjum og ókendum peningastovni, har tey so møguliga ikki fáa nakrar serliga sømdir. Tá kunnu tey við einum lykili og einum loyniorði til nýggju skipanina fara inn á sínar egnu konti her í Føroyum, hóast tey eru stødd í til dømis Danmark, greiðir Eyðfinn frá. Hann veit tó ikki endaliga at siga, nær henda skipanin fer í gongd. Fyri framman liggur nú Ábyrgdarafundurin, sum nú verður fyri fimtu ferð. Hann hevur verið annaðhvørt ár, síðani 1995, og undirtøkan fyri honum hevur verið alsamt vaksandi. Til ábyrgdarafundin fyri tveimum árum síðani, rundaði talið av ábyrgdarum tey 1.500. Í dag eru umleið 300 fleiri. Til seinasta fundin vóru góð 700 fólk og væntast kann, at undirtøkan verður minst líka góð aftur í ár – um ikki betur.

Ábyrgdarafundurin í ár verður tann 21. mars í Kí høllini. Á fundunum plaga at vera umframt góðan mat, sangur, tónleikur, undirhald og ein fyrilestur um eitt hvørt aktuelt, sum er frammi. Í ár fer Magni Arge, stjóri á Atlantsflog, at halda fyrilestur um møguleikar og vansar við føstum sambandi undir Leirvíksfirði. Og danin, Finn Nørbygaard fer saman við pianisti at standa fyri einum parti av undirhaldinum.

### Framtíðin

Tá tosað verður um framtíðina hjá Norðoya Sparikassa eru bæði Eyðfinn og Óli Marner eitt sindur varnir við at úttala seg.

– Tað liggur ikki nakað ítøkiligt á borðinum beint nú, men tað bleiv eisini sagt á aðalfundinum í dag, at vit fara ikki at byggja út bara fyri at byggja út. Tað er ikki rætt at fara at byggja út, bara tí at tíðirnar eru góðar. Tað skal byggjast eftir tørvi, sigur Óla Marner Christiansen.

Norðoya Sparikassi eigur trý hús, sum liggja rundan um økið, har høvuðsavgreiðslan er. Eitt av teimum húsunum er nú rivið niður, og tað næsta eru teir í ferð við at ríva niður. Júst hvat skal gerast har, er tó ikki greitt enn, men helst verður talan um parkeringsøki. Men Sparikassin hevur frætt, at kommunan hevur ætlanir um at gera økið har um leiðir til eitt skúlaøki, so áðrenn tað er greitt, hvat kommunan ætlar, er ikki hugsingur um til dømis at bygt út.

Báðir siga teir eisini, at núverandi bygningurin altíð fer at verða nýttur.

– Tað er ein viss sjarma í bygninginum, soleiðis sum hann sær út í dag, og hann fer altíð at verða nýttur. Og hann liggur eisini sera væl fyri, heldur stjórin fyri. Og hann leggur afturat, at hóast har kann tykjast trongligt, so ger tað tað samstundis, at samstarvið millum starvsfólkini er avbera gott. Tað er so stutt hjá teimum at renna ímillum, um tey hava eitt hvørt, tey skulu finna útav aðrastaðni í bygninginum.

Tá bygningurin bleiv umbygdur til soleiðis, sum hann sær út í dag, starvaðust eini 13 – 15 fólk á høvuðsdeildini. Í dag eru tey omanfyri 20.

– So tey hava verið eitt sindur framman fyri sína tíð tá, tað er vist, sigur Eyðfinn og smílist við.

Báðir siga teir eisini við ein munn, at um nú Sparikassin fer at byggja út, so verður tað ikki til tess at fáa fleiri kassar ella líknandi.

– Vit fara at byggja út fyri viðskiftafólkið, um so verður, sigur Óla Marner. Her hugsar hann til dømis um, at um ein kundi ynskir at fara til viks inni á høvuðsdeildini, so er ikki serliga gott pláss til tað, sum nú er.

– Men, men bíða nú, vit mugu fyrst bíða og fáa at vita, hvat hendir, áðrenn nøkur avgerð verður tikin um møguligar útbyggingar, sigur Óla Marner Christiansen at enda, og Sparikassastjórin skoytir upp í, at til ta tíð noyðast tey helst eisini at verða eitt sindur framman fyri teirra tíð

SKEIÐ Í DEKORATIÓN



Samskifti
Tel. 422 900
e-mail: samskifti@samskifti.fo
Postboks 133 · 110 Tórshavn
www.samskifti.fo

Skeiðið er ætlað øllum áhugaðum.

Endamálið evið skeiðinum er at geva luttakaranum grundleggjandi innlit í at seta saman vørur, litir og ljós.

*Innihald*
Skeiðið viðgerð í høvuðsheitinum hesi evni:

*Uppseting *Linjur *Samanseting *Brennidepil *Tað gylta snittið *Symmetri *Asymmetri *NCS litsirkul- og trýkant *Psykologiskir virkningar *Skuggaspæl *Effektljós *Ymisk sløg av ljósi v.m.

Skeiðið er leygardag og sunnudag 8 og 9 mars 2003 í Lærarakúlan, Tórshavn
Skeiðið endar við einari eftirmetan og einum skreytblaði.
Kostnaður kr. 2.900,-

Meira fæst at vita við at vitja heimasíðu okkara www.samskifti.fo

*Seinasta freist at tekna seg er leygardagin 5. mars á samskifti@samskifti.fo ella á tlf. 422 900*